# Elduvíkar kommuna

hevur samtykt at seta á stovn dagrøktarskipan frá og við 6. august 2001.

Í hesum sambandi verður søkt eftir tveimum dagrøktarmammum:

- einari dagrøktarmammu, sum eisini skal hava leiðsluna av skipanini.
  Vanlig løn verður givin fyri dagrøktaruppgávuna, og eyka samsýning fyri leiðsluuppgávuna.

- og einari dagrøktarmammu

Umsókn og møgulig viðmæli verður at senda til

**Elduvíkar Kommunu**
477 Funningsfjørður

áðrenn 16. juli 2001.



Vit søkja eftir

# feriuavloysara

at byrja skjótast gjørligt. Hevur tú staðið í handli fyrr og dámar tær væl hetta samskifti við fólk, set teg í samband við okkum.

SIRI
liv & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
FO-100 Tórshavn
Tlf. 316610 Fax 316610



# Lærlingur til Seytjan!

Hevur tú áræði og hug til at gerast lærlingur í okkara fyritøku?

- hevur tú hug at arbeiða við móta og litum?
- ert tú røkin og fryntligur?
- ikki bangin fyri at taka tøk?
- umsøkjarin má hava FHS ella HH.

Um hettar hevur tín áhuga, send so okkum eina skrivliga umsókn innan 1. juli 2001.

**Sp/f Seytjan**
Boks 127
110 Tórshavn



# Vørukoyring

Lýst verður eftur bilførara til vørukoyring og annað nú í summarferiuni.

Møguleiki verður fyri at fáa fast arbeiði annað hvørt vikuskifti aftan á feriuna, so hetta er serstakliga vælegnað til ein skúlanæming við koyrikorti.

BREYÐMOLIN
**Ringið 444388 ella 220230**


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3190

Navn: Sp/f ESG
Adressa: Áargeil 9, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 21.06.2001
Viðtøkudato: 21.06.2001
Kapitalur: Kr. 286.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 286.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Eyðfinn Sigurstein, Áargeil 9, 100 Tórshavn.
Stjórn: Eyðfinn Sigurstein, Áargeil 9, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonatgøta 18, Box 16, 110 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka byggi- og arbeiðstakaravirksemi og annars annað starv í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 28. juni 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3167

Navn: Sp/f Auxilior Technology
Adressa: 826 Trongisvágur

Kommuna: Froðbiar Kommuna
Stovningardato: 26.05.2001
Viðtøkudato: 26.05.2001
Kapitalur: Kr. 290.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 1.000,00 til kurs 100 og kr. 289.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: Tim Wentzlau, 826 Trongisvágur og Elken Holm, 826 Trongisvágur.
Stjórn: Tim Wentzlau, 826 Trongisvágur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f ADS-grannskoðan, 826 Trongisvágur.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál: Tilevning av KT-tøknifrøði og veiting av tænastum í samband við kunningartøkni.

Skráseting Føroya tann 27. juni 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3183

Navn: Sp/f P.E.
Adressa: Tjarnarlág 39, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 01.06.2001
Viðtøkudato: 01.06.2001
Kapitalur: Kr. 100.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 100.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Petur Eirik Djurhuus, Tjarnarlág 39, 100 Tórshavn.
Stjórn: Petur Eirik Djurhuus, Tjarnarlág 39, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Eyðfinnur Guðjónsson, Tórgarðsgøta 13, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil o.a. í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 27. juni 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3188

Navn: Sp/f T.J.H. Entreprenørar
Adressa: c/o Tórleif J. Hansen, 485 Skálabotnur.

Kommuna: Skála Kommuna
Stovningardato: 07.06.2001
Viðtøkudato: 07.06.2001
Kapitalur: Kr. 110.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 110.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Tórleif J. Hansen, 485 Skálabotnur.
Stjórn: Tórleif J. Hansen, 485 Skálabotnur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Revisión, v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka entreprenørvirksemi - keyp/søla.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 27. juni 2001

Kristin Balle


FØROYA PEDAGOG FELAG

# Summarfrí

Felagið hevur stongt vegna summarfrí frá 16. juli- 13. august 2001.

**Nevndin**



# Frá Føroya Læraraskúla

FØROYA LÆRARASKÚLI

Freistin at lata umsóknir inn er longd til 3. juli.

**Læraraskúlin**



SMS søkir eftir

# húsi í Tórshavn til leigu

til tvey vaksin og eitt barn.
Húsini mugu verða klár at flyta inn í innan 1. august 2001.

Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.

SMS

P/F SMS POSTBOKS 1059 FO-110 TÓRSHAVN TLF. 313041 FAX 317434



Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo





# Vørugoymsla

Við hesum verður vørugoymslan í Sp/f Hjá Lis í konkurs lýst til sølu. Goymslan fevnir um konufólkaklæði, undirklæði, kosmetikk o.a.

Goymslan verður seld undir einum. Undirritaði kurator í búnum skilar sær rætt til at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

Áhugaði kunnu fáa nærri upplýsingar við at venda sær til undirritaðu

**Fríðu Patursson, adv.**
Fr. Petersensgøta 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145



# Handilsinnbúgv

bíliga til sølu.

**Bókabúðin**
600 Saltangará
Tlf. 449292



# Gras – Gras

fæst ókeypis í Havn. Kom við líggjanum.

**Tlf. 312355**


LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Kunngerð

**Ávaring í sambandi við seismiskar forkanningar í Leirvíksfirði**

Í sambandi við forkanningar til tunnil undir Leirvíksfirði, verður tað í tíðarskeiðinum 28.06.01 og til 25.07.01 arbeitt við seismiskum kanningum í Leirvíksfirði.

Arbeitt verður frá Hagaleiti norður móti Leirvíkar bygd og yvir móti Borðoynni.

Av tí at skip fer at arbeiða við fastari og viðbreknari útgerð, verða øll, ið ferðast gjøgnum Leirvíksfjørð, biðin um at vísa fyrilit.

**Landsverkfrøðingurin**


CLEOPATRA

# Søkt verður eftir

mannfólki at arbeiða í barr í vikuskiftinum.

Áhugaði kunnu ringja á

**tlf. 226420**


**Toll- og Skattstova Føroya**
**Streymoyar Øki**

# Størv leys at søkja

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar Øki, eru hesi størv leys at søkja:

**Posttolldeildin:** Eitt avloysarastarv niðursetta tíð til setan umleið 1. september og eitt ár fram, og eitt fast starv fulla tíð.

Í báðum førum umfatar starvið kannan og eftirlit við vørum í sambandi við tollingaráheitanum og annað arbeiði í sam-bandi við tollavgreiðslu.

Umsøkjarar við royndum innan tollarbeiði hava fyrimun.

**Kassin á Tollbúðini:** Eitt fast starv fulla tíð sum hjálparfólk við kassan. Arbeiðsuppgávur: Vanligt kassaarbeiði, inn- og útgjøld umframt annað arbeiði í samband við kassan. Umsøkjarar við kunnleika til kassa/avgreiðsluarbeiði hava fyrimun.

**Virkiseftirlitsdeildin:** Eitt fast starv fulla tíð. Arbeiði umfatar málsviðgerð og eftirlit innan skatt, toll og avgjøld. Ynskjandi er, at umsøkjarar hava í minsta lagi HH prógv e.l. og hava viðkomandi útbúgving og royndir innan umsiting.

**Skattadeildin:** Eitt fast starv fulla tíð. Arbeiðsuppgávan umfatar partafelags/roknskapar-líkning, eftirlit og annað arbeiði í hesum sambandi. Ynskjandi er, at umsøkjarar hava í minsta lagi HH prógv og royndir innan roknskapararbeiði.

Toll- og Skattstovan bjóðar starvsfólkunum ymsar innanhýsis útbúgvingar. Møguleiki er eisini at útbúgva seg uttanhýsis við ávísum stuðli frá stovninum. Kravt verður, at viðkomandi, ið settur verður, luttekur í øllum viðkomandi innanhýsis útbúgvingum, og helst eisini í viðkomandi uttanhýsis útbúgvingum.

**Løn og setanarviðurskifti** eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett eftir útbúgving og viðkomandi starvsroyndum.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðingar um størvini fáast við at seta seg í samband við Eyðfinn Hansen, tlf. 310260.

Størvini verða at seta august/september í ár, og skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, ummælum v.m. skulu sendast til

**Toll- og Skattstovu Føroya**
Streymoyar Øki
Postboks 3139
110 Tórshavn

innan 25. juli 2001.


Sosialurin
www.sosialurin.fo


# Tiltøk í juli 2001

**Summarframsýningin er opin til 31. juli.**
**14 listafólk búsitandi í Føroyum hava verk við á framsýningini.**

**Sunnudagur 01. kl. 14.30**
NMPU-Ráðstevna
Í samb. við NMPU-Ráðstevnuna verður: Konsert við Hanus og Aldubáruni

**Mikudagur 04. kl. 19.30**
Føroya Jazztónleikarafelag og NLH skipa fyri Jazzfestivali

**Hósdagur 05. kl. 19.30**
Filmur: Tro, Håb og Trolddom

**Fríggjadagur 06. kl. 19.30**
Føroyskt mentanarkvøld v/ Vár Jacobsen og Páll Danielsen. Á skránni verður: sjónleikur, tónleikur, kórsangur og føroyskur dansur

**Leygardagur 07. kl. 22.00-03.00**
Føroysk Dansinátt v/Sláið Ring

**Leygardagur 14. kl. 16.00**
Framførsla av verkætlanini »Fenris«. Fyriskipari Sjónleikarafelagið Fívil

**Fríggjadagur 20. kl. 19.30**
Føroyskt mentanarkvøld v/ Vár Jacobsen og Páll Danielsen. Á skránni verður: sjónleikur, tónleikur, kórsangur og føroyskur dansur

**Leygardagur 21. kl. 16.00**
Konsert v/Fólkatónleikarafelagnum

**Sunnudagur 22. kl. 14.00-18.00**
MFS lestrastevna fyriskipari Sissal Kristiansen

**Sunnudagur 22. kl. 16.00**
Summartónar í Gjáar kirkju: Gunnhildur Halla Gudmundsdóttir og Ólavur Jacobsen.
**kl. 19.30** Summartónar í Bygdahúsinum við Gjógv: Gunnhildur Halla Gudmundsdóttir og Ólavur Jacobsen

**Mikudagur 25. kl. 19.30**
Fyrilestur/Norski søgugranskarin, Knut Helle, professari, Noreg

**Leygardagur 28.**
Ólavsøkuaftan. Húsið er opið: **kl. 14.00-20.00**
**Sunnudagur 29.**
Ólavsøkudagur. Húsið er opið: **kl. 14.00-20.00**
**Mánadagur 30.**
Húsið er opið: **kl. 14.00-18.00**

***Broytingar í skránni kunnu koma fyri.***
***Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.***
***Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00 -18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00.***
***Kaffistovan er opin, tá ið húsið er opið.***

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**

Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790
e-mail: nlh@nlh.fo · http://www.nlh.fo
Tekstvarp í SvF frá síðu 650